# KÍ-smádreingir á altjóða fótbóltfestival

**Hesa seinastu tíðina hava nakrir sera spentir KÍ-smádreingir verið at sæð á fótbóltsvøllinum í Klaksvík tíðliga hvønn morgun. Nú ræður nevniliga um at fínpussa taktikk og annað, tí sunnumorgunin fara teir til Århus at luttaka í eini stórari altjóða fótbóltskapping**



*KÍ-smádreingirnir.
Aftast frá vinstru: Bárður Heinesen, Andrias Ellingsgaard, Páll A. Klettsgarð, Árni Petersen, Hjalti Heðinsson, Eli Simonsen, Jógvan Isaksen og Bogi Jacobsen.
Fremst frá vinstru: Pól J. Poulsen, Sámal Olsen, Daniel Hákunsson Dam, Óli Jacobsen, Eilif Arge, Eli Andreasen, Jan Elmar Sørensen og Teitur Fles*

FÓTBÓLTUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Teir hava summarfrí og høvdu annars ivaleyst ligið í songini hesa tíðina á døgninum. Men sjálvt um klokkan bara er 10 henda fyrrapartin, og tað oysregnar, hómast nakrir KÍ-smádreingir á vøllinum gjøgnum allan mjørkan. Nú er ikki at sova, tí hetta er ein av seinastu møguleikunum, teir hava, at fínpussa spælið, áðrenn farið verður á altjóða Football-Festival í Århus.

Støðið á venjingini er høgt, og tað er alt hitt eisini. Spildurnýggju fótbóltsbúnarnir eru klárir, og er nakað, teir ivast í, er bara at fara inn á heimasíðuna www.football-festival.dk, har kappingarskráin longu eru at síggja, og øll onnur tíðindi allatíðina verða dagførd.



*Mjørki og regn hava ikki forðað KÍ-smádreingjunum at møta upp til venjing tíðliga hvønn morgun seinastu dagarnar*

### »Komið og spælið!«

KÍ-smádreingirnir eru sum vera man ógvuliga spentir. Teir hava klárað seg rættiliga væl í ár og gjørdust vinnarar av steypakappingini, so sjálvsálitið er í topp. Og tað fáa teir eisini brúk fyri, so teir ikki hvørva millum hini umleið 100 liðini úr allari verðini, sum verða við í fótbóltskappingini í Århus.

Ongin ivi er um, at tað er fótbóltur, hendan altjóða Football-Festival fyrst av øllum snýr seg um. Umframt sjálva kappingina kunnu dreingirnir nevniliga eisini gleða seg til at síggja ein uppvísingardyst millum tvey altjóða oddalið og at hitta onkrar av teimum heilt kendu fótbóltshetjunum.

Men luttakarnir sleppa eisini at verða saman um annað enn fótbólt hesar dagarnar í Århus. Undir heitinum »Komið og spælið!« eru dagarnir nevniliga skipaðir sum ein festivalur við konsertum, diskotekum og øðrum undirhaldi um kvøldarnar, har teir fleiri túsund luttakarnir kunnu taka sær av løttum og fáa møguleika at knýta nýggj vinarbond.

### Eldhugaður foreldrabólkur

Í ferðalagnum verða trý foreldraumboð við, sum mugu sigast at hava ein sera virknan og ágrýtnan foreldrabólk aftanfyri seg. Longu tíðiliga í ár fóru tey holt við at savna pening inn til ferðina við tiltøkum sum tombola og stuðulsrenning, og beint fyri Norðoyastevnu vóru foreldur og dreingir at síggja í gøtunum í Klaksvík við trilliborum og kustum, tá tey hjálptu at rudda býin fyri kommununa.

– Stuðulin frá foreldrunum hevur gjørt okkara arbeiði ómetaliga nógv lættari, sigur Finn Johannessen, sum saman við Hans Jacob Heinesen er venjari hjá KÍ-smádreingjunum.

– Vit eru sloppnir at brúka alla okara orku uppá venjingina, og nú vit fara avstað, nýtist okkum ikki at hugsa um nakað annað enn spælið og sjálva kappingina. Tað hevur ótrúliga nógv at siga, at venjarnir ikki skulu ganga og hugsa um, um klæðini nú eru vaskaði ella um dreingirnir nú fáa okkurt ordiligt at eta, sigur Finn.

Alt slíkt taka tey trý foreldraumboðini sær av. Tey hava býtt liðið í trý, soleiðis at tey hava ábyrgdina av 5-6 dreingjum hvør. Tey fara at halda eyga við øllum frá songartíðum til pengarnar hjá dreingjunum, so foreldrini, sum verða eftir heima, heldur ikki nýtast at hugsa um nakað. Leygarmorgunin verða tey boðin til seinasta felags foreldrafundin, og eftir at dreingirnir eru farnir,

kunnu tey og onnur framvegis fylgja teimum á heimasíðuni www.finneverton-.com, har úrslitini av kappingini verða dagførd hvønn dag.

KÍ-smádreingirnir skulu spæla sín fyrsta dyst mánadagin kl. 16.50, og síðani verður spælt næstan uttan steðg restina av vikuni. Teir koma aftur næsta leygardag, uttan iva móðir og troyttir, men heilt vist eina stóra uppliving ríkari.

Vit á Sosialinum ynskja KÍ-smádreingjunum góðan túr og góða eydnu i kappingini.



*Venjarnir Finn Johanessen og Hans Jacob Heinesen við steypinum, sum KÍ-smádreingirnir vunnu í steypakappingini í ár*

# Skálaberg heim við 1000 tonsum av kongafiski

*Tey umleið 1000 tonsini av kongafiski, sum Skálaberg í løtuni leggur upp á Kósini í Klaksvík, verða útflutt til Japan og Kina, har prísurin er heilt hampiligur*




Mikukvøldið koma Skálaberg aftur á Klaksvík við knøppum 1000 tonsum av skráskornum kongafiski. Í løtuni liggur hann á Kósini og leggur veiðuna upp. Arbeiðið gongur skjótt og væl, siga landararnir, sum fríggjamorgunun høvdu fingið umleið helvtina av lastini í land.

Kongafiskurin verður útfluttur til Japan og Kina, har prísurin plagar at vera heilt hampiligur. Hanus Hansen, reiðari, hevur ikki tey heilt neyvu tølini enn, men sigur, at prísurin eru betri, enn hann var í fjør.

Skálaberg fór í Irmingarhavið 10. mei, og burtursæð frá onkrum smávegis truppulleikum við spælinum, hevur alt riggað, sum tað skal. Steðgurin heima verður stuttur hesuferð. Eftir ætlan fer Skálaberg longu avstað aftur 27. juli.

– Vit kundu sjálvandi allir hugsað okkum at verið heima á Ólavsøku, men vit hava tíverri ikki tíð at bíða longur, sigur Hanus, sum sjálvur verður við ein part av næsta túri, tá leiðin gongur í Barentshavið eftir toski.

**-ave-**

ítróttur

Nr. 140 • leygardagur • 24. juli 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Dreymurin er at fylgja øllum róðrunum beinleiðis á stórskíggja



*Dreymurin er, at tað skal bera til at fylgja við kappingini á øllum róðrarteinunum*

**Umstøðurnar hjá áskoðarunum undir kappróðrinum á Ólavsøku eru væl betri, enn tær hava verið, men formaðurin í HR heldur, at tað hevði verið hugaligt, um tað hevði borið til hjá áskoðarunum at fylgt við á øllum teininum**

ÓLAVSØKU-KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*

Tað er stórur spenningur hjá áskoðarunum, tá ið teir fara at hyggja eftir ólavsøkukappróðrinum. Men tað er eingin loyna, at umstøðurnar kundu verið betri at fylgt við kappingunum, hóast tær eru munandi batnaðar seinnu árni, og hóast tær á Ólavsøku kanska eru betri, enn tær eru nakra aðra staðni.

Umstøðurnar eru batnaðar á tann hátt, at tað nú ber til at standa í fleiri røðum og fylgja við síðsta endaspurtinum í hesum róðrarárinum. Havnar Róðrarfelag hevur seinastu árini bygt áskoðarapláss burturúr plattum á Molanum. Tað fara teir eisini at gera í ár. Longdin er umleið hálvt hundrað metrar ella meiri enn tað, og tað ber til hjá einari rúgvu av fólki at standa her og fylgja við.

Men tað er framvegis soleiðis, at áskoðararnir bara eru eygnavitni til ein lítlan part av róðrinum. Størsti parturin av tíðini fer til at fylgja við í útvarpinum, og so er tað hugnin at standa saman við øðrum kappróðrarhugaðum. Hann er ikki minst treytaður av, hvussu veðrið er. Tað møta altíð nógv upp til ólavsøkukappróðurin, men tað er munur á, at fjøldin er størri, tá ið veðrið er gott, enn tá ið tað er minni gott.

### Dreymurin

Tey seinnu árini er tað vorðið alt meiri vanligt, at stórskíggi verður nýttur. Á stóru fótbóltsvøllunum kring Europa eru heilt stórir stórskíggjar, har tað ber til hjá áskoðarunum at endursíggja spentu støðurnar á sama hátt, sum tað ber til hjá teimum, sum sita heima í stovuni og frammanfyri sjónvarpið.

Enn er hetta ikki aktuelt í kappróðrinum í Føroyum, og tað er ivaleyst fyrst og fremst ein spurningur um pengar, tí tekniskt ber so nógv til í dag, sum var óhugsandi fyri ikki so langari tíð síðani. Men formaðurin í Havnar Róðrarfelag, Heðin Hansen, er við uppá tað, tá ið vit bera hugskotið frá einum sera áhugaðum áskoðara á bygd víðari til hansara:

– Tað hevði verið fantastiskt, um vit kundu havt stórskíggjar ymsa staðni kring kappróðrarøkið, har tað bar til at fylgja við í øllum róðrinum. Men so skuldi tað bara borið til at fylgt við hjá teimum, sum frammanundan høvdu goldið fyri at síggja kappróður, er formaðurin í HR skjótur at leggja afturat. Hann droymir um, hvussu hugaligt tað verið, um stórskíggjar vóru á Molanum, undir Skipafelagnum, í Tinganesi, á ískeiini, har alt fleiri hava savnast seinastu árini og kanska eisini á Argjahøvda, har nógv argjafólk plaga at savnast fyri at geva teirra bátum ein kikkstart, sum tað plagar at verða tikið til. Gongdin higartil í ár leggur upp til, at tey á Argjahøvda verða ikki færri hesa ferð, enn tey hava verið hini árini.

Men hetta er veruleikafjart?

– Í dag er hetta veruleikafjart. Men tað hevur so ofta víst seg, at tað, sum er veruleikafjart so skjótt kann gerast veruleiki. Havnar Róðrarfelag hevur mann umborð á útvarpsbátinum, sum tekur allar róðrarnar upp á video. Millum róðrarfólk er sera stórur áhugi fyri at fáa eitt kopi av hesum við sær til hús aftur, og eg havi skilt, at tað verður nógv hugt eftir hesum upptøkunum. Jú, vit mugu ásanna, at beinleiðis varping av øllum róðrunum frá Argjahøvda og inn undir Skipafelagið á stórskíggja er dreymur og ikki veruleiki. Men tað hevði verið optimalt, um tað gjørdist til veruleika, droymir Heðin Hansen saman við bygdarmanninum, sum í vikuni ringdi til okkara við hesum hugskotinum.

### Ymsir mátar

Tað tykist vera eitt sindur ymiskt, nær manningarnar halda, at síðsta venjingin skal vera undan ólavsøkuróðrinum. Onkrir flota longu í dag bátin til síðstu venjingina í hesum kappingarárinum, og aðrir fara eisini at venja í morgin.

Ólavsøkuaftan er ikki fyrrenn mikudagin, og vit hava hoyrt frá onkrari manning, at teir ætla sær eisini at venja mánadagin. Tá ið tað fyrr í summar hevur verið kappast leygardagin, hava flestu manningar vant síðstu ferð hóskvøld, men onkur hevur eisini vant fríggjakvøld.